Áðrenn Otodrom í Istanbul:

# Massa vann turkisku koyringina

**Hóast formel 1 breytin í Istanbul er spildurnýggj, og formel 1 bilar ikki hava koyrt á hennið fyrr, hevur Sauber koyrarin Felipe Massa longu vunnið koyringina**



*Felipe Massa hevur royndarkoyrt nýggju breytina á Playstation 2*

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*

Hetta sigur hann við www.f1.com. Hann greiður frá, at hann hevur roynt breytina á síni Playstation 2, og hevur vunnið á truplastu styrki í sínum egna Sauber C24.

Hann sigur, at breytirnar vanliga eru sera líkar veruleikanum í Playstation spølunum, og at hann tí er spentur at vita, hvussu breytin roynist sunnudagin. Massa er annars ikki ovast á listanum yvir sannlíkar vinnarar í Istanbul Otodrom breytini.

Fernando Alonso í Renault og teir báðir McLaren koyrararnir Kimi Raikkonen og Juan Pablo Montoya, eru mennirnir, sum væntandi fara at kappast um størsta heiðurin sunnudagin. Men eisini nummar trý í heimsmeistarakappingini Michael Schumacher fekk fyrstu byrjunarstøðu í Budapest, og vísti eina løtu nógva ferð.

Nógvir spurningar eru í sambandi við koyringina sunnudagin. Talan er um eina spildur nýggja breyt, og hetta ger at flestu lið standa við sama trupulleika, tey kenna ikki breytina.

Flestu koyrararnir eru spentir, og meta breytina at vera sera spennandi, við fleiri rættuliga annarleiðis avbjóðingum. Breytin hevur smáar brekkur, skjótar langsíðir og spakulig sving, nøkur av svingunum hava einki sýni.

Asfaltið nýtt og hetta ger, at breytin broytist nógv teir fyrstu dagarnar, hetta ger sjálvandi arbeiðið við at finna røttu dekkini og røttu uppsetingina til koyringina. Dekkframleiðararnir Michelin og Bridgestone hava havt fólk á staðnum, sum hava gjørt kanningar av breytini og, sum hava roynt at gera best møguliga dekkið til koyringina.

Væntandi verða hitastigini sera nógv, asfalti kann gerast upp til 50 hitastig, og hetta slítur dekkini illa, og ger koyringina sera krevjandi fyri koyrarnar. Eitt annað sum eisini er krevjandi er, at teir koyra ímóti sólarringinum, og vanliga koyra teir hin vegin, og hetta ger at vøddarnir í nakkanum verða brúktir á ein annan hátt enn vanligt.

Formel koyrararnir hava seinastu tríggjar vikurnar verið í summarfrí, tí er ikki lætt at vita hvat er hent í ymisku liðunum hesar vikurnar.

Eitt sindur av spenningi er komið í HM kappingina aftur, serliga er tað í kappingini fyri lið at McLaren-Mercedes nærkast Renault, og við bæði Montoya og Raikkonen í toppformi er spurningur hvussu nógv av teimum 12 stigunum, sum skilja liðini verða eftir tá vikuskiftið er fari afturum.

Enn eru seks koyringar eftir, hetta er 60 møgulig stig. Í løtuni liggur Alonso 26 stig framman fyri Raikkonen, so einki er avgjørt enn.

## FAKTA

**Um turkisku koyringina á Istanbul Otodrom**

Umferðir: 57
Breytarlongd: 5,340 km
Skjótast umferð: Eingin enn
Longdin á koyringini: 309.720
Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Nürburgring: Eingin enn

*Kelda www.f1.com*



*Soleiðis sær nýggja breytin í Istanbul út*

## Støður, Formel 1

**Koyrarar**

| **Navn** | **Land** | **Merki** | **Stig** |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 87 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 61 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 55 |
| Jarno Trulli 36 | | Italia | Toyota |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | 34 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 32 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 31 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 30 |
| Nick Heidfeld | Týskland | BMW-Williams | 28 |
| Mark Webber | Australia | BMW-Williams | 24 |
| Jenson Button | Stórabretland | BAR | 19 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 19 |
| Felipe Massa | Brasil | Sauber-Petronas | 8 |
| Tiago Monteiro | Portugal | Jordan | 6 |
| Alexander Wurz | Eysturríki | McLaren-Mercedes | 6 |
| Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 6 |
| Narain Karthikeyan | India | Jordan | 5 |
| Pedro de la Rosa | Spania | McLaren | 4 |
| Christijan Albers | Holland | Minardi | 4 |
| Christian Klien | Eysturríki | Red Bull | 4 |
| Patrick Friesacher | Eysturríki | Minardi | 3 |
| Takuma Sato | Japan | BAR | 1 |
| Vitantonia Liuzzi | Italia | Red Bull | 1 |

**Bilar**

| **Merki** | **stig** |
|---|---|
| Renault | 117 |
| McLaren | 105 |
| Ferrari | 86 |
| Toyota | 68 |
| BMW-Williams | 52 |
| Red Bull | 24 |
| BAR | 20 |
| Sauber-Petronas | 14 |
| Jordan | 11 |
| Minardi | 7 |

# Barrichello skal koyra BAR-Honda

**Rubens Barrichello staðfestir, at hann framvegis hevur ætlanir um at vinna HM-kappingina**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Líka síðan Felipe Massa skrivaði sáttmála við Ferrari fyri næsta kappingarár, fyri nøkrum vikum síðan, hevur minst loyniligi loynidómurin í formel 1 verið, at Rubens Barrichello hevði undirskrivað sáttmála við BAR-Honda. Tí varð eingin serliga skakkur, tá BAR-Honda og Barrichello kunngjørdu, at tey høvdu skrivað undir ein sáttmála, sum byrjar frá næsta kappingarári og er galdandi fleiri ár fram.

Rubens Barrichello hevur seinastu seks árini koyrt fyri Ferrari liðið, og hevur øll árini staðið í skugganum á sjeyfalda heimsmeistaranum Michael Schumacher. Fleiri ferð er Barrichello biðin um at lata sleppa Schumacher framvið, tí týskarin hevði brúk fyri stigunum, í royndini at vinna eitt av sínum nógvu heimsmeistarheitum.

Barrichello sigur sambært www.poleposition.dk, at hetta er ein roynd at endurvinna drívmegina, og at hann ætlar sær at vinnað HM. Tað er tó ikki ein illur ella ónøgdur Barrichello, sum fer frá Ferrari. Hann sigur, at hann er takksamur fyri tíðina hjá Ferrari, hann hevur vunnið nógvar koyringar, og hevur verið við til at vunnið nógv liðmeistaraheitið.

Michael Schumacher sigur um Barrichello, at hetta er besti liðfelagið, sum hann nakrantíð hevur havt, og at teir hava havt nógvar stuttligar løtur uttan fyri breytina og góðar dystir á breytini. Men hann sigur samstundis, at hann skilur avgerðina hjá Barrichello. Hann heldur eisini, at tað kann gerast sera spennandi at fáa ein nýggjan ungan koyrara inn í liðið, hann heldur, at hetta væl kann geva liðnum eitt lyft av onkrum slagi.

Hvør nýggi liðfelagin hjá Barrichello verður er enn ivasamt. Núverandi BAR-Honda koyrarin, bretin Jenson Button, vil heldur enn fegin halda fram hjá BAR, men hann undirskrivaði í fjør ein sáttmála við Williams liðið um at koyra fyri teir frá 2006. Spurningurin er so, um BAR-Honda sleppa at keypa Button leysan úr sáttmálanum, tí eingin ivi er um, at bæði liðini sera gjarna vilja hava hann í sínum bili.

Tað tykist tó eingin ivi at vera um, at hin BAR-Honda koyrarin japanski Takuma Sato ikki koyrir fyri BAR-Honda næsta kappingarár. Hann hevur staðið í skugganum á Button alla tíðina, men hetta kappingarárið hevur gingið av skriðuni hjá honum, og tað var ikki fyrr enn í seinastu koyring, at hann endiliga fekk stig.